Dystir um vikuskiftið

Hondbóltur

1. deild kvinnur

26.10	14.30	Neistin-VB
27.10	14.30	StÍF-VÍF

1. deild menn

26.10	16.00	Neistin-H71
26.10	17.20	KÍF-Kyndil
26.10	19.00	VÍF-Tjaldur

Flogbóltur

Meistaradeild, kvinnur

26.10	13.00	ÍF-Mjølnir
26.10	15.00	TB-Fleyr
27.10	13.00	Mjølnir-TB
27.10	14.00	Dráttur-KÍF

U

26.10	14.00	SÍ-Fram
26.10	15.00	ÍF-Mjølnir
27.10	15.00	ÍF-SÍ

Hondbóltsstøður

Deild kvinnur

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VB	3	3 - 0 - 0	73	59	14	6
2	Neistin	4	2 - 1 - 1	84	75	9	5
3	VÍF	3	2 - 0 - 1	73	61	12	4
4	Kyndil	4	2 - 0 - 2	107	96	11	4
5	Stjørnan	4	1 - 1 - 2	80	85	-5	3
6	StÍF	3	1 - 0 - 2	74	86	-12	2
7	Tjaldur	5	1 - 0 - 4	102	131	-29	2

1. Deild menn

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	StÍF	4	3 - 0 - 1	120	104	16	6
2	Neistin	4	3 - 0 - 1	107	99	8	6
3	Kyndil	3	2 - 0 - 1	90	78	12	4
4	VÍF	3	2 - 0 - 1	83	78	5	4
5	H71	3	2 - 0 - 1	71	70	1	4
6	KÍF	3	0 - 0 - 3	60	76	-16	0
7	Tjaldur	4	0 - 0 - 4	103	129	-26	0

Flogbóltsstøður

Meistaradeild, kvinnur

		d	v - t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1	Mjølnir	1	1 - 0	3	0	3	2
2	Dráttur	1	1 - 0	3	1	2	2
3	ÍF	1	1 - 0	3	2	1	2
4	TB	1	0 - 1	2	3	-1	0
5	Fleyr	1	0 - 1	1	3	-2	0
6	KÍF	1	0 - 1	0	3	-3	0

Meistaradeild, menn

		d	v - t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1	SÍ	1	1 - 0	3	0	3	2
2	Mjølnir	1	1 - 0	3	1	2	2
3	ÍF	0	0 - 0	0	0	0	0
4	Fram	1	0 - 1	1	3	-2	0
5	Fleyr	1	0 - 1	0	3	-3	0

Næstan dupult

Ikki færri enn fýra dystir í bestu kvinnudeildini verða á skránni um vikuskiftið

FLOGBÓLTUR-KVINNUR
Jákup Mørk

Tað er av álvara komin ferð á flogbóltin. Talan er kanska bert um næsta umfarið í landskappingini, sum verður hetta vikuskiftið, men dystirnir eru í øllum førum nógvir í tali.

Teir báðir fyrstu av hesum verða leiktir leygardagin, og er tað her serliga dysturin á Kambsdali millum ÍF og Mjølnir, sum tykist spenanndi á pappírinum.

ÍF vann í fyrsta umfarinum á verandi meistarunum úr TB, og tí hava tær í løtuni eina grundaða vón um eina endastøðu hampuliga ovarlaga á stigatalvuni. Tað er tó lítið at ivast í, at skalt tú meta um styrkina í føroyskum kvinnuflogbólti, so má ein dystur móti Mjølni til, og tað er júst hetta, sum ÍF sleppur at royna um vikuskiftið.

Í Trongisvágitekur TB leygardagin móti Fleyr. Eftir tapið í fyrsta umfarinum er einki at ivast í, at tvørákvinnurnar nú vllja reisa seg, og tað kann best gerast við einum sigri á Fleyr, sum í fyrsta umfarinum mátti lúta fyri Drátti.

Lítil hvíld

TB kvinnurnar fáa lítla og onga hvíld eftir dystin leygardagin. Beint eftir døgurða sunnudagin skulu tær nevnliga aftur standa til reiðar, tá tær skulu leika dyst í Klaksvík, har Mjølnir tekur ímóti. Her veðrur talan um dyst millum tey bæði sterkastu liðini í undanfarna kappingarári, og tí verður helst spennandi at síggja, hvussu leikur fer hesaferð.

Seinasti dysturin hjá kvinnunum verður á Giljanesi, har Dráttur tekur ímóti uppflytarunum úr KÍF. Sum nevnt seinast, so er hetta fyrsta ferðin, at KÍF roynir seg í meistaradeildini, og tí hevur tað helst nógv at siga hjá teimum, at tær nú gera sær royndir av at spæla í bestu deildini. Sjálvandi er vónin eisini, at stig fáast til høldar, men tað verður í øllum førum trupult at vinna sær hesi á Giljanesi.

Stórdystir á Kambsdali

Eftir at teir høvdu frí seinasta vikuskiftið, skulu fuglfirðingar tveir dagar á rað spæla dyst móti liðum, sum væntandi fara at gera um seg í oddinum

FLOGBÓLTUR-MENN
Jákup Mørk



Menninir hjá ÍF sleppa upp í part hetta vikuskiftið, og uppgávurnar kundu valla verið truplari enn tær eru, nú bæði Mjølnir og SÍ koma á vitjan

ÍF var einasta av teimum fimm liðunum í meistaradeildini hjá monnum, sum hevði frí seinasta vikuskifti, men nú sleppa fuglfirðingarnir so at royna seg. Bæði leygar- og sunnudagin skulu teir nevnliga á heimavølli royna seg móti liðum, sum heilt vístætla sær at vera við í oddinum, og so er spurningurin, hvørt ÍF eisini ætlar sær hendan leiklutin.

Gevur ábendingar

Leygardagin verður tað Mjølnir, sum koma á vitjan, og hetta líkist einum sera spennandi dyst. ÍF var í finaluni í FK-kappingini, og lítið er at ivast í, at liðið hevur evnini til eina topplásering í ár. Mjølnir hevur tó eisini eitt sera sterkt lð í ár við millum annað styrki úr Bulgaria, so dysturin teirra millum fer kanska at geva eina ábending um, hvussu oddurin í ár fer at myndast.

Eisini takast SÍ og Fram leygardagin. Sørvingar hava aftur í ár eitt sera sterkt lið, og so er spurningurin, um Fram megnar at fylgja við, ella um missurin av Rúna Weihe kennist ov tungur.

Seinasti dysturin verður sunnudagin, tá Sørvingar fara á vitjan á Kambsdali. Aftur her fær ÍF vitjan av einum liði, sum ætlar sær at verða við, har tað hendir, og so er spurningurin, hvørt fuglfirðingarnir megna at vísa, at tað ætla teir sær eisini. Tað hava teir sum sagt tveir møguleikar til um vikuskiftið.

Tríggir greiðir favorittar

Hjá monnunum sigur stigatalvan, at talan er um tríggjar greiðar favorittar um vikuskiftið, men onkra staðni kann tó væl vera, at hesar verða argaðir

MANSHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tríggir dystir eru á skránni í manshondbólti hetta vikuskiftið, og allir verða teir leiktir leygardagin.

Í høllini á Hálsi í Havn tekur Neistin móti H71, og mett eftir úrslitunum higartil er einki at ivast í, at Neistin eru favorittar til dystin. Gaman í hava hoyvingar enn bert tapt ein dyst, men á pappirinum hevur mótstøðan verið væl veikari, enn hon hevur verið hjá Neistanum. Hinvegin, so hevur spælið hjá Neistanum ikki verið líka sannførandi hvørja ferð, og tað kundi meira enn so hent seg, at H71-venjarin, sum er gamal Neista-maður, hevur onkran trumf í arminum, nú hann skal royna seg móti Neistanum.

Útlendskur styrkur

Tað tykist Kári Durhuus eisni at hava, tá hann í Hoyvíkshøllini skal royna seg við KÍF ímóti Kyndli. Kyndil tykist annars at hava fingið veruliga ferð á nú í seinastuni, men beint undan vikuskiftinum fingu kollfirðingarnir leingi saknaða styrkin úr útlandinum, og so er spurningurin, hvussu nýggju leikararnir fara at roynast í dysti.

Seinasti dysturin verður í Vestmanna, har VÍF tykist mest greiði favoritturin av øllum, tá Tjaldur kemur á vitjan. Vestmenningar máttu kanska lúta fyri StÍF sunnudagin, men skal metast eftir avrikinum hjá Tjaldri móti Kyndli hósdagin, so er lítið at ivast í, at VÍF er stórfavorittur til tann dystin.

Vikuskifti

Nr. 206 • leygardagur • 26. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Róm – kaos og mentan hvørt um annað

Allir vegir føra til Róm

Lesið ferðafrásøgn síðu 6 & 7

Úr egningarskúri til Hannover

Øssur Hansen fer ikki aftur í egningarskúrin, men bíðar eftir skipsboðum. Hvussu kendist tað hjá hesum – einum av okkara mest royndu fótbóltsspælarum – at dystast móti heimsins næststerkastu fótbóltstjóð?

FÓLK Á GØTUNI
Vilmund Jacobsen

Øssur Hansen er 31 ára gamal. Hann er ikki maðurin við teimum stóru orðunum og ger ikki nógv burtur úr sínum ítróttarligu avrikum. Spyrt tú um okkurt, fært tú eitt vinarligt, skilagott og vælumhugsað svar. Hann hevur áhuga fyri nógvum og hevur roynt eitt sindur av hvørjum.

Evnarikur sum ítróttarmaður er hann sum fáur. Tíðliga taldist hann millum fremstu borðtennisleikarar, og vann hann sær fleiri FM-heiti. Í talvi hevur hann syft mangan mannin frá borðinum og vunnið FM-heitir. At enda hevur hann eisini vunnið FM í frælsum ítrótti, har hann gjørdist føroyameistari í renning. Í hæddarlopi vann hann silvur.

Sostatt hevur hann verið føroyameistari í fýra ymiskum ítróttargreinum.

Øssur er útbúgvin elinnleggjari, men honum dámar betur tey arbeiði, har arbeiðstíðin ikki liggur millum 8 og 17. Hann ræðist ikki agnroyk og fløkjustampar, tí seinasta árið hevur hann verið landformaður hjá Páll Højgaard á Toftum, sum rekur útróðrarbátin, Trygva. Sum ungur, hevði hann ábyrgdina av egningini hjá øðrum útróðrarbáti.

Áðrenn Øssur fór til Týsklands at spæla landsdyst, gjørdi hann av at gevast í skúrinum og søkja sær kjans við skipi.

- Mær dámar væl at arbeiða í skúrinum, men kundi nú hugsað mær at sloppið til skips, sigur hann.

Øssur hevur søkt um kjans við nýggja Stapanum, men veit ikki, um tað fer at eydnast at sleppa við.

- Eg vænti ikki, tað verður beinanvegin, sigur hann.

Øssur Hansen millum faðir og móðir, Debus og Torborg Hansen, í túninum á Toftum. – Vit vóru øll ógvuliga spent, tá ið Føroyar leiktu landsdyst móti Týsklandi, sigur Torborg.

Mynd: Vilmund Jacobsen

Í dysti móti týsku heimsstjørnunum

Øssur Hansen var við á føroyska fótbóltslandsliðnum, sum í síðstu viku spældi landsdyst móti Týsklandi, og hann var á vøllinum allan dystin.

Hvussu kendist tað at fara úr egningaskúrinum á Toftum og skula møta heimsins næststerkastu fótbóltstjóð?

- Jú, tað er eitt upplivilsi hvørja ferð, og hesaferð var tað nakað serstakt, tí vit hava leingi droymt um hendan dystin.

Øssur sigur, at menn vóru ógvuliga spentir og uppsettir, og tað var ikki sørt, at nervarnir vóru uppá spæl, áðrenn farið varð inn á vøllin.

- Vit væntaðu eitt øgiligt ódnarveður, og tað fingu vit eisini. Tá ið týskarar fingu brotsspark og mál beinanvegin, sá ikki gott út; tá mundu fleiri av okkum bera ótta fyri stórtapi. Trýstið linkaði, og vit sóu, at tað bar til at spæla – eisini frameftir vøllinum. At málmaðurin stóð so serstakliga væl, gav okkum eisini gott mót. Við endan av fyrra hálvleiki fingu vit so javnandi málið sum gjørdi, at vit av álvara fóru at trúgva uppá eitt gott úrslit.

Øssur heldur ikki, at týsku málmøguleikarnir í so stóran mun stóðust av góðum álopsspæli, men meira av, at okkara menn mistu bóltin í óhepnari støðu.

- Tá ið seinni hálvleikur byrjaði, væntaðu vit aftur ódnaðarveður, tí fyri týskararnar var 1-1 støðan avgjørt einki at reypa av. Vit fóru innaftur við góðum treysti og vildu leggja alla orku í at halda støðuna teir fyrstu 15-20 minuttirnar. Men tá ið vit høvdu spælt einar 10 minuttir, fingu týskarar næsta málið. Byrjanin til hetta málið var eitt feildømt innkast, sum heilt upplagt var okkara.

Øssur sigur, at hóast týskarar fingu næsta málið, vísti tað seg, at føroysku leikararnir trúðu uppá eitt gott úrslit.

- Vit valdu at halda fram og ansa eftir ikki at detta ov langt aftur á vøllin og samstundis geva týsku leikarunum minst møguligt pláss. Eg haldi, at Fróði Benjaminsen og Julian Johnson megnaðu óføra væl at bróta týska spælið og vinna nakrar bóltar. Tá ið so týskarar byrjaðu at keglast sínámillum, merktu vit, at rímiliga væl stóð til, og at vit ikki høvdu tapt dystin.

Øssur sigur, at hugburðurin var góður, og leikararnir vóru væl fyri hóast hørðu mótstøðuna.

- Eg haldi, at týska spælið passaði væl til okkara fótbólt, og uppleggið hjá okkum var skilagott. Vit settu okkum fyri at gera týskarunum tað trupult og taka ferðina av teimum.

Drógu tíðina út

Tað var ein undarlig kensla at sita frammanfyri sjónvarpsskíggjanum og síggja týsku heimsstjørnurnar draga tíðina út móti endanum av dystinum.

- Ja, ta kensluna hevði eg eisini. Teir vildu gardera seg við tí støðu, teir høvdu. Týski málmaðurin drálaði við at sparka bóltin útaftur, og har afturí á vøllinum spældu leikarar ímillum sín. Hetta var ein undarlig kensla móti eini so stórari fótbóltstjóð, sigur Øssur.

Spurdur, um leikararnir vóru vónsviknir, tá ið útjavnandi møguleikin varð misnýttur stutt fyri leiklok, sigur hann.

- Ja, tað vóru vit sjálvandi, men hetta var reint óhepni. Hjalgrím Elttør royndi tað, hann kundi og bólturin, sum rakti stongina og smeyg sær út um, kundi eins væl havt rakt stongina og farið inn í málið.

Øssur sigur, at bæði Hendrik Larsen og Jógvan Martin Olsen vóru stak væl nøgdir við avrikið, og menn vóru samdir um, at við eitt sindur størri hepni móti endanum, kundi úrslitið verið ein javnleikur móti Týsklandi.

Um sítt egna avrik í dystinum, heldur Øssur Hansen, at tað var um miðal.

- Eg royndi at verja sum best og koma framvið, tá ið høvið beyðst. At steðga týsku leikarunum hvørja ferð, var vónleyst. Sum heild var eg nøgdur við mítt avrit, sigur toftamaðurin, sum nú ætlar sær til skips eina tíð.